

## Ársins fótbóltsspælari í Reykjavík

Símun Samuelsen er ársins fótbóltsspælari í Reykjavík í 2009, og hann varð eisini valdur ársins spælari í Keflavík í summar. Harafturat gjørdist Símun Samuelsen nummar trý sum ársins ítróttarfólk á Reykjavíkarleiðini, sum varð kosið nýggjársaftan. Símun er 24 ára gamal, og hevur spælt við Keflavik síðan 2005. Hann hevur spælt 73 dystir fyri liðið í bestu deildini, og hevur tilsamans fingið 18 mál, 11 steypadystir við fýra málum og 10 UEFA-dystir við tveimum málum. Hann gjørdist steypavinnari við Keflavík í 2006 og hevur eisini spælt 27 landsdystir fyri Føroyar.




VÍF-kvinnurnar høvdu munin við varierandi álopsspæli – her er tað vongurin, Tóra Seloy, ið skorar av strikuni – meðan StÍF serliga hevði trupulleikar í verjuni, sum fangaði lítið og einki

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### StÍF-VÍF 25-29 (13-15):

# Vinnandi VÍF-kvinnur

**Eftir at hava ligið og rótað í botninum saman við VB alt kappingarárið, hava VÍF-kvinnurnar tikið seg nógv fram í síðstuni. Umframt at vera í steypafinaluni, eru tær nú eisini leysar av botninum**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Ferð eftir ferð hava hondbóltskvinnurnar í Vestmanna víst góðar taktir í síðstuni, og dysturin á Skála í gjár var einki undantak. StÍF, sum annars alt árið hevur ligið trygt í miðjuni, fekk ongantíð fatur á VÍF, men darlaði aftanfyri alla tíðina – onkra løtuna enntá langt aftanfyri.

Mestsum allan fyrra hálvleik var VÍF tvey og trý mál frammanfyri, og eitt skifti í seinna hálvleiki líktist tað stórsigri, tí ta einu løtuna vóru heili átta mál á muni. Men samstundis sum VÍF tók sær meira av løttum ímóti endanum, ernaðust StÍF-kvinnurnar og gjørdu eitt hál, ið minkaði ósigurin niður í fýra mál.

Største munurin á liðunum var verjuspælið, tí meðan kvinnurnar úr Vestmanna vóru neyvar og nærlagdar, so fyrst og skjúttarnir hjá StÍF ikki skuldu sleppa ov nógv framat, var verjan hjá StÍF fyri tað nógva sum ein opnhjallir, ið alt slapp ígjøgnum.

Einasti spælarin hjá StÍF, sum VÍF ongantíð ordiliga fekk fatur á, var Fríðrún Danielsen á høgra vongi, men annars eydnaðist fyri tað nógva at taka broddin av álopsroyndunum hjá StÍF. Rebekka fekk gamaní skotið gott og væl helvtina av málunum hjá StÍF í seinna hálvleiki, men einsamøll hótti hon ikki nóg nógv.

### Varieraðu væl

Hinvegin hevði VÍF góða breidd og dygd í sínum álopsspæli, ið var nógv meira varierað og gjøgnumhugsað. Mál komu úr øllum ættum, og sjálvsálitið lýsti av gulklæddu kvinnunum, ið Adina Chiricescu í StÍF-málinum ikki hevði lært at lisið av fyrr enn ímóti endanum, tá hon forðaði fyri tí heilt stóra skrædlinum við tveimum ella trimum góðum bjargingum, tá VÍF-kvinnur komu einsamallar ímóti málinum.

Sum heild undirstrikaði sigurin hjá VÍF, at kvinnurnar í Vestmanna veruliga hava fingið luft undir veingirnar í síðstuni. Fyrst vunnu tær seg í steypafinaluna og síðani hava tær nú vunnið tvær tær síðstu ferðirnar, so tær eru komnar upp á seks stig – tvey stig aftan fyri StÍF og fýra stig framman fyri VB.

Komandi dysturin verður sera avgerandi fyri, hvussu árið fer at hilnast hjá VÍF, tí um tvær vikur skal VÍF til Vágs at spæla ímóti VB. Hetta kann tó gerast tungt hoyggj at draga, tí hesin dysturin er ikki minni avgerandi fyri VB…

Forrestin, so er tað sjáldsamt at síggja tvey so skikkilig lið á vøllinum sum í gjár, tí tað gjørdist ongantíð neyðugt hjá dómarunum at hava fingrarnar á lofti og vísa nøkrum spælara út!

## Gott fyri sjálvsálitið

– Hetta vóru sera týdningarmikil stig fyri okkum, og vit kunnu ikki siga annað, enn at hetta hevur verið ein góð vika, tí hon hevur givið fýra stig. Og at so VB tapir stórt fyri Neistanum, samstundis sum vit vinna á StÍF, er bara gott fyri okkum, sigur Liljan Djurshuus, sum við 10 málum var toppskjútti í dystinum á Skála í gjár.

– Vit hava alla tíðina ligið í botninum og hava ongantíð kent okkum tryggar. Tað gera vit heldur ikki enn, tí nógv er eftir av kappingarárinum, men hetta er avgjørt gott fyri sjálvsálitið hjá okkum. Hetta hava verið nakrar ótrúliga góðar vikur fyri okkum, nú vit bæði eru komnar í steypafinaluna og eru blivnar leysar av botninum.

Liljan Djurhuus ásannar eisini, at tað hevur ávirkan á so nógv, at úrslitini byrja at koma og at liðið hevur eitt sindur av viðráki.

– Eg haldi, at spælið koyrir eitt sindur betur hjá okkum, og tá vit so vinna, verður hugurin at venja og spæla eisini nógv betur.

hil

## Fakta um dystin

**StÍF-VÍF 25-29 (13-15)**
**10 min:** 4-5
**20 min:** 8-10
**40 min:** 16-19
**50 min:** 19-27
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8 (2), Fríðrún Danielsen 6, Roxana Bodirláu 5, Bobra Adriana 2 (2), Anna L. Petersen 2, Rósa Danielsen 1
**VÍF:** Liljan Djurhuus 10 (2), Agnas Olsen 5, Heidi Joensen 3 (2), Tóra Seloy 3, Elisa Leo 2, Halla Midjord 2, Katrin Christophersen 1, Linda Davidsen 1, Finngerð Jensen 1, Rakul Joensen 1
**Brotskøst:** StÍF 5, VÍF 5
**Útvísingar:** StÍF 0, VÍF 0
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr